FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-069_1.4
dags. 03-02-2010

Til Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Boks 3279
Fo - 100 Torshavn
mmr@mmr.fo

Viðv. Uppskoti um at broyta fólkaskúlalógina og skipa landið í skúlaøki.

Í telduposti dagfestur 17 desember 2009 hevur Mentamálaráðið sent felagnum uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan til hoyringar.

Hoyringsfreistin er er mikudagin 3 februar 2010. Harumframt hevur felagið verið til ein hoyringsfund í Mentamálaráðnum týsdagin 26 januar 2010.

Viðmerkingar til uppskotið
Føroya Kommunufelag tekur sum heild undir við ætlanunum at endurskoða bygnaðin á fólkaskúlaøkinum, við tí fyri eyga at styrkja fakliga innihaldið í skúlanum, og at tryggja at vit fáa sum mest burturúr fíggjarliga tilfeinginum. Men felagið metir at alt ov nógv ivamál eru í uppskotinum

Yvirskipaða ætlanin við uppskotinum er at geva landsstýriskvinnuni størri fyrisitingarligar heimildir til, í semju við kommunurnar, at broyta skúlabygnaðin soleiðis at skúlarnir kunnu verða samskipaðir í størri skúlaeindir. Lítil iva man verða um, at tað verður trupult at finna semjur í flestu økjum landinum, og í slíkum førum fær Landsstýriskvinnan nærum óavmarkaðar heimildir. Felagi kann ikki taka undir við at Mentamálaráðið á hendan hátt ger seg inn á kommunala sjálvræði.

Føroya Kommunufelag undrast á at Mentamálaráðið kemur við hesum uppskotið, ið gevur landsstýriskvinnuni munandi størri heimildir í mun til fólkaskúlan, samstundis sum Mentamálaráðið hevur luttikið í arbeiðinum at skriva kommunuálitið, sum hinvegin leggur upp til at kommunurnar skulu yvirtaka fólkaskúlan. Hvørki kommunuálitið ella ein møgulig útlegging av fólkaskúlanum verður tikið uppá tungu í fyriliggjandi uppskoti.

Sambært uppskotinum skulu kommunurnar ganga saman í skúlasambond til heilt ella lutvíst at skipa síni viðurskifti í felags skúlaøki. Men einki nágreiniligt er um hvussu hesi sambond fíggjarlig, fyrisitingarliga og bygnaðarliga skulu skipast.

Hevur Mentamálaráðið ætlanir um at skipa nýggj millum kommunal samstørv við fyriskipanarligum bygnaði, so er hetta ikki í tráð við tað sum mælt verður til í kommunuálitinum. Føroya Kommunufelag ivast eisini stórliga í ,at hesin leistur at gera enn eitt fyrisitingarligt stig, hevur politiska undirtøku. Landsstýrið hevur boðað frá ætlanum um ein nýggjan kommunalan bygnað 1 januar 2011, men sum eftir øllum at døma er útsett til 1 januar 2013. Felagið undrast tí á at Landsstýriskvinnan í

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Mentamálum samstundis arbeiðir við at broyta skúlabygnaðin við virkna frá 1 august 2011, í andsøgn við tilmælini í kommunuálitinum. Her er eingin samanhangur.

Uppskotið reisir eisini fleiri ítøkiligar spurningar, millum annað:

Í viðmerkingunum stendur skrivað, at landskassin framhaldandi bara fer at lata studning til flutning fyri sjúkar og avlamnar næmingar. Merkir hetta at stuðulin til vanligan næmingaflutning, sum í dag er 50 %, skal avtakast?. Hvussu er ætlanin at øktu útreiðslurnar til næmingaflutning skulu fíggjast?. Skal hetta verða samhaldsfast ímillum kommunurnar í skúlasambandinum?

Hvussu skal útbygging, viðlíkahald og útvegan at undirvísingaramboð í eftirverandi skúlum framyvir fíggjast, er hetta av skúlasambandinum, og hvør er politiski mynduleikin í hesum sambandi?

Føroya Kommunufelag sær stóran vanda fyri atgerðarloysi í mun til komandi útbyggingar á skúlaøkinum. Kommunurnar avgera suverent hvørjar íløgur tær gera á skúlaøkinum. Kunna vit til dømis vænta at kommunur sum eru trýstar at steingja sínar egnu skúlar, glaðbeintar fara at gera neyðugar íløgur í eftirverandi skúla/ar í økjunum? Ella hinvegin er ætlanin at kommunurnar sum hava fingið loyvi til framhaldandi at hava skúla, skulu fíggja neyðugu íløgurnar fyri næmingar úr øðrum kommununum eisini?

Er tað veruliga ætlanin hjá Landsstýrinum at tungu málsøkini framyvir skulu skipast í kommunalum samstørvum, so má neyðugt lógar- og regulerings grundarlag gerast. Hetta er fyrst og fremst ábyrgdin hjá Innlendismálaráðnum sum varar av kommunumálum, sama innlendismálaráð sum staðiliga mælir ímóti slíkari skipan tí hon brýtur við fólkaræðisligar meginreglur, við at viðgerðin av ávísum økjum verða flutt úr fólkavalda kommunustýrinum í eitt millum kommunalt forum, sum tó ikki kann taka fíggjarligar bindandi avgerðir uttan at einstaka kommunustýri samtykkir.

Felagið mælir til at ætlanirnar hjá landsstýrinum verða samskipaðar.

Samanumtikið
Føroya Kommunufelag tekur sum sagt fult undir við ætlanunum at endurskoða bygnaðin á fólkaskúlaøkinum, við tí fyri eyga at styrkja fakliga innihaldið í skúlanum og at tryggja at vit fáa sum mest burturúr fíggjarliga tilfeinginum

Felagið metir tó ikki at hetta uppskotið loysir stórvegis trupulleikar, men heldur hinvegin letur upp fyri hópin av ósemjum millum land og kommunur, og kommunurnar ímillum.

Felagið mælir til at Mentamálaráðið greitt boðar frá hvørjar yvirskipaðar ætlanir ráðið hevur. Er ætlanin at landið skal taka fulla ábyrgd av skúlanum, ella eru ætlanir um skúlin skal leggjast kommununum at umsita. Við hesum uppskotið verður fólkskúlin framhaldandi eitt býtisbarn ímillum land og kommunur, og í veruleikanum er talan um eitt afturstig í mun til ætlanirnar at fáa eitt greiðari uppgávu- og fíggjarligt ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

FØROYA KOMMUNUFELAG

Felagið mælir somuleiðis til at Mentamálaráðið tryggjar sær, at arbeiðið við bygnaðarbroytingum á fólkaskúlaøkinum, er í samsvar við ætlanirnar um bygnaðarbroytingar á Kommunala økinum.

Tá hesi viðurskifti eru avgreidd, eigur Mentamálaráðið samráð við kommunufeløgini at fara undir neyðugar bygnaðarbroytingarnar á fólkaskúlaøkinum

Vegna
Føroya Kommunufelag

Asbjørn Djurhuus
Formaður

Eyðun Christiansen
Ráðgevi

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo